MINNINGARGRUNNUR DÁNJAL NICLASEN

Við hesum verður sagt frá, at umsóknir fyri 2000 um stuðul úr Minningargrunni Dánjal Niclasen eiga at vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin hin 20. juli 2000.

Umsóknarblað fæst við at seta seg í samband við Fiskasøluna, tel. nr. 345345, og verður at senda til nevndina í Minningargrunni Dánjal Niclasen:

Minningargrunnur Dánjal Niclasen
c/o Føroya Fiskasøla
Mykinesgøta 5
FO-100 Tórshavn
Att.: Hans Johannes á Brúgv, nevndarformaður

Endamálið við Minningargrunni Dánjal Niclasen er at stuðla ungum føroyingum, ið vilja útvega sær víðari útbúgving innanfyri føroyska fiskivinnu, eitt nú hvat viðvíkur:

1. *Kanning av fiskiskapi uttanfyri Føroyar, sum kann bera í sær nýggjar veiðuheittir ella veiðu av fiskasløgum, ið ikki hava verið vanlig í Føroyum.*
2. *Víðari útbúgving, ið hevur við viðgerð og góðsking av fiski og fiskavørum at gera.*
3. *Marknaðarkanningar til frama fyri føroyska fiskivinnu.*
4. *Serútbúgving i handils- og fíggjarviðurskiftum, sum hava við fiskivinnu at gera.*

INPACT INTERNATIONAL

Almenn móttøka

Í sambandi við at

Jógvan Sundstein

gevst tann 1. juli 2000 sum stjóri í P/F Grannskoðaravirkinum INPACT, bjóða vit til móttøku á Hotel Hafnia Hósdagin 29. juni 2000 frá kl. 15.00 til 17.00

P/F Grannskoðaravirkið *INPACT*
statsaut. revisorar

Toll- og Skattstova Føroya, Stýrið

Rættað lýsing

Samskipari í innkrevjingarmálum

Avloysarastarv sum samskipari av allari innkrevjing av almennari skuld er leyst at seta skjótast til ber. Starvið er skipað undir eftirlitsdeildini í Stýrinum.

Verandi deildarstjóri í innkrevjingini er í farloyvi í løtuni, og kemur tann, ið verður settur í starvið, tí saman við øðrum persóni í stýrinum at taka sær av fleiri av uppgávunum sum deildarstjórin vanliga hevur tikið sær av.

Arbeiðsuppgávur:
Starvið er fjølbroytt. Tú kemur í samband við nógv fólk runt í landinum. Starvið er bæði fakliga og persónliga avbjóðandi. Tú fært eisini møguleika at luttaka á skeiðum, sum kunnu menna teg til tær avbjóðingar, ið starvið ber í sær. Í løtuni verður arbeitt við at menna eina nýmótans og einfalda innkrevjingarskipan, og kemur tann, ið settur verður, at luttaka í hesum arbeiði.

Annars eru høvuðsuppgávurnar í stýrinum, sum viðkomandi saman við øðrum persóni kemur at taka sær av, m.a. hesar.

- at samskipa dagliga arbeiðið og eftirlitið við innkrevjingini við virksemið hjá Toll- og skattstovuni annars við beinleiðis ábyrgd yvir fyri eftirlitsdeildini í stýrinum.
- at skipa fyri samskiftinum við lógardeildina í stýrinum
- at skipa fyri tí neyðuga samstarvinum við eftirlitið á Økisskrivstovunum
- at skipa fyri vegleiðing og kunning til Økisskrivstovurnar
- at skipa fyri, at virkisøkir, ið verða løgd til Økisskrivstovurnar, verða væl og virðiliga umsitin
- at skipa fyri útbúgving av starvsfólki til innkrevjing
- at koma við krøvum, sum kunnu betra um EDV-skipanina, sum innkrevjingin er við at menna
- at hjálpa til við útpantingum í økjum, har hetta er neyðugt
- at taka sær av øðrum uppgávum, sum eru álagdar Toll- og skattstovuni

Førleikakrøv
Ynskiligt er, men tó ongin treyt, at tann, ið settur verður, hevur kunnleika til edv og nakað av leiðsluroyndum. Tað er ein fyrimunur, at tú hevur royndir við innkrevjing av peningakrøvum úr øðrum starvi, góð samstarvsevni, evni at samskipa og seta í verk fyriskipanir.

Setanarviðurskiftir:
Starvið verður sett við pantiheimild, og verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir teirra.

Umsóknir:
Umsókn við avritum av prógvum, ummælum, CV og tilvísingum skulu sendast til

Toll- og Skattstovu Føroya
Stýrið
Postsmoga 2151
Traðargøta 39
FO 165 Argir

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 27. juni 2000. Um nakar ynskir fleiri upplýsingar um starvið, kann viðkomandi seta seg í samband við Toll- og Skattstovu Føroya, Stýrið, tlf. 352026, lokal 457

Um stovnin:
Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum. Stovnurin hevur 145 starvsfólk og er skipaður soleiðis at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Í stýrinum eru fýra deidir: Eftirlitsdeidin, Lógardeildin, Menningardeildin og Umsitingardeildin. Tær 6 økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

GRAVSTEINAR OG KANTSTEINAR.
NÚ EISINI ÚR FØROYSKUM GRÓTI

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til útlandið

Til útisetar í Danmark
Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað

Danstein
Gravsteinar, kantsteinar og blómubeð

Skjót levering

Tel. 318323
Tel. 447512
Tel. 217512
Fax 449961

RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN
www.danstein.fo

Tvey stig á lei›ini

Mynd: Jens K. Vang

Tá brei›bandskervi› í Svínoy alment var› tiki› í n‡tslu í gjár, var ta› eitt stig á lei›ini at náa tveimum av teimum málum, sum landsst‡ri› hevur sett sær fyri

RÚNAR REISTRUP

Sjálvur landsst‡rinsma›urin í vinnumálum, Finnbogi Arge, var í Svínoy í gjár, tá framkomna fjarskiftiskervi›, i› er sett upp í Svínoy í sambandi vi› verkætlanin "Tykissamfelag-Svínoy", alment var› tiki› í n‡tslu.

Fyri hann var ta› ein møguleiki at røkka tveimum málum vi› einari verkætlan, tá lærarin og bygdará›sforma›urin í Svínoy, Jógvan Edmund á Geilini, setti seg í samband vi› Vinnumálast‡ri› og vísti fram ætlanir sínar um at kn‡ta Svínoy tættari umheiminum vi› kunningartøkni.

- Í okkara or›a›a vinnupolitikki er ein av fremstu ra›festingunum, at kunningartøknin skal mennast. Harumframt liggur ta› í politikkinum hjá landsst‡rinum, at útija›arøkini skulu mennast. Hesa verkætlan síggi eg sum eitt stig á lei›ini á bá›um økjum, sigur vinnumálará›harrin vi› Sosialin, me›an vit sigla úr Leirvík til Svínoyar í heldur baldrutum ve›ri.

Hugsandi at a›rar oyggjar koma vi›

Verkætlanin er ein sokalla› "pilot-verkætlan" og ta› liggur í hesum, at ta› er eitt undangongutiltak. Finnbogi Arge heldur tó, at ta› væl er hugsandi, at onnur lokalsamfeløg - helst á smáum útoyggjum - í framtí›ini fara at fylgja í fótsporunum á verkætlanini í Svínoy. Men ta› ver›ur ikki Vinnumálast‡ri›, i› tekur fyrsta stigi›.

- Ta› mest umrá›andi í einari verkætlan sum hesari er, at hugur og vilji er á sta›num, fyri at føra hana út í lívi›. Ta› nyttar líti› at vit fara út og siga vi› eina útoyggj, at nú skal hon kn‡tast saman vi› brei›bandskervi. Ta› má fyrst og fremst vera eitt ynski um at menna seg tann vegin, og ta› kann eg siga, at ta› hevur ta› veri› í Svínoy, sigur landsstyrisma›urin í vinnumálum, Finnbogi Arge, nú vit fara um Svínoyarfjør›, og báturin rullar øgiligt.

Stór fø›ingardagsgáva

RÚNAR REISTRUP

Jógvan Edmund á Geilini hev›i fø›ingardag í gjár, tá hann tók ímóti umbo›um frá landsst‡rinum, Fjarskiftiseftirlitinum, KT-deplinum, Farodane og fjølmi›lunum, i› øll vóru komin til Svínoyar at síggja verkætlanina "Tykissamfelag - Svínoy" gerast veruleiki.

Og ta› var ein gle›ilig gáva, sum hann hevur arbeitt leingi fyri, i› hann fekk handa›a á fø›ingardegi sínum - nevniliga brei›bandsamband, i› kn‡tur tveir tri›jingar av Svínoyar bygd saman og ígjøgnum servara út á neti›.

- Eg sendi eina umsókn inn til landsst‡ri› í februar í fjør, og í dag stendur alt klárt. Ta› hevur tiki› eitt gott ár, og ta› var umlei› ta›, sum eg hev›i vænta›.

Í rø›u síni, sum hann helt í Svínoy, greiddi Jógvan Edmund frá, at ta› eru li›in eini 4 ella 5 ár sí›an fyrsta telda kom til Svínoyar. Hon kom beinanvegin á interneti›. Hetta var á›renn táverandi Telefonverki› bjó›a›i út internet, so ikki kann sigast anna›, enn at svínoyingar vóru skjótir á veg.

- Í dag er Svínoy ta› sta›i› í Føroyum, i› hevur flestu teldur pr. íbúgva, greiddi bygdará›sforma›urin og stigtakarin til verkætlanina frá.

Umframt sjálvt brei›bandsambandi›, fekk Jógvan Edmund eina a›ra fø›ingardagsgávu. Ta› var Farodane, i› gav honum eit web-kamera.

- Hatta skal standa úti á Ei›, so svínoyingar altí› kunnu fara á neti› at hyggja, hvussu kyrran er útfyri Svínoynna, seg›i ein fegin bygdará›sforma›ur, tá hann lat gávuna upp.

KT vinnan tekur seg saman

RÚNAR REISTRUP

Hósdagin var› felag stovna›, i› skal røkja áhugamálini hjá føroyskum fyritøkum á KT- og fjarskiftisfyritøkunum.

Hesar eru mentar nógv farnu árini, bæ›i í tali og í stødd, og nú flestu av feløgunum valdu at taka seg saman í eitt áhugafelag, eru í alt fimtan feløg, i› kunnu kalla seg limir í KT felagnum.

Hesar fimtan eru: Elektron, Føroya Tele, Telenet, El & Tele, VIT, Formula.fo, Farodane, Munin, Hansoft, Navision Software, Com-Data, Sam-Teld og Teldutænastan. Felagi› heldur til í Vinnuhúsunum.